## Smugla nógv vápn til Danmarkar



Skotvápn úr gamnla Jugoslavia og øðrum eysturevropeiskum londum streyma til Danmarkar. Tað sgur Orla Olesen hjá smuglingareftirlitinum í samrøðu við blaðið JydskeVestkysten. 105 starvsfólk hjá danska skattaverkinum hava til uppgávu at forða smuglarum, men Orla Olesen sigur, at tey eru ov fá. Sum dømi nevnir hann, at við markið millum Danmark og Týskland, sum er 72 kilometrar langt, eru 10 fólk til at ansa eftir tí, sum kemur um markið. Í fjør løgdu tollvaldið og løgreglan hald á 1.800 skotvápn. Umleið helmingurin komu úr gamla Jugoslavia og Eysturevropa.

## Munur á innflytarum

Í Noregi vil Framburðsflokkurin hava stjórnina at avmarka talið á innflytarum úr londum, sum hava aðra mentan enn ta vesturlendsku. Formaðurin í flokkinum, Siv Jensen, segði um vikuskiftið, at myndugleikarnir mugu taka sær um reiggj, áðrenn partar av Oslo verða stýrdir eftir sharia-lógunum. Í gjár samtykti landsnevndin hjá Framburðsflokkinum so at heita á stjórnina um at nokta kki-vesturlendskum innflytarum innferðarloyvi so leingi, sum tað yvirhøvur ber til.

# Kreppan eigur at savna fakfelagsrørsluna

**Tá sáttmálarnir á almenna arbeiðsmarknaðinum ganga út tann 1. oktober í 2010, er tað ein søguligur møguleiki at savna fakfelagsrørsluna, heldur Magnus Tausen, lærara-formaður**

ARBEIÐSMARKNAÐUR
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Tað eru serliga boð eftir fakfeløgunum nú kreppan tykist vera veruleikin. Hetta sigur Magnus Tausen, formaður í Føroya Lærarafeg í oddagrein í Skúlablaðnum, sum kom út um dagarnar.

- Allir sáttmálar á almenna arbeiðsmarknaðinum ganga út 1. oktober í 2010. Tað er søguligur møguleiki at skipa samráðingarnar øðrvísi, so allir partar í góðari tíð kunnu áseta lønarkarm, áramál, skipa sáttmálarnar saman og fremja felagsátøk, sigur Magnus Tausen í oddagreinini.

Eisini fílist hann á, at politikarar og bankar royna at fjala út yvir kreppuna.

- Í slíkum tíðum eru boð eftir fakfeløgum, sum kunnu standa saman og sláa ring um fólkið, sigur Magnus Tausen, sum vísir á, at fakfeløgini hava gjørt vart við, at lønarhækkingarnar hava ikki vart móti hækkandi prísum.

- Løntakarin fær ikki ágóðan av lønarhækking síni í góðum tíðum. Og tá prísir og rentir lækka, fáa vit heldur ikki ágóðan, tí bankar og onnur taka sín ríkiliga lut. Alt snýr seg um reallønina, og har eru fakfeløgini og landsmyndugleikarnir í sama parti, sigur Magnus Tausen.

Hann heldur tað vera løgið, tá ið sagt verður, at alt er so nógv dýrari her, tí vit eru so smá og fjarskotin.

- Sjálvt rentulækking skal førast so langt norður, at størsti parturin er burtur, áðrenn hon er framkomin. Tí er tørvur á einum krútsterkum eftirliti, sum myndugleikarnir ikki hava viljað raðfest, sigur hann.

- Fakfeløgini mugu eisini gera sítt. Tað gera vit best saman, tí vit hava orkuna, sigur formaðurin í Føroya Lærarafelag.



*Tað er nú, at boð eru eftir einari sterkari fakfelagsrørslu, sum kann standa saman og sláa ring um fólkið, sigur Magnus Tausen, formaðurin í Føroya Lærarafelag*

# Sveis kanska somu lagnu sum Ísland

**Nógv bendir á, at vakra alpulandið Sveis verður næsta ofrið í fíggjarkreppuni, og at landið fær somu lagnu sum Ísland, sigur viðurkendur fíggjarfrøðingur við sveisiskt blað**

BÚSKAPUR
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Fíggjargeirin í Sveis er í vanda fyri at fáa somu lagnu, sum tann íslandski. Orsøkin er, at sveisiskir bankar hava lænt so nógvan pening til óstøðuga eystureuroeiska fíggjarmarknaðin.

Hetta sigur viðurkendi fíggjarfrøðingurin, Arthur P. Schmidt, við sveisiska blaðið, Tages Anzeige, har hann teknar eina sera dapra mynd av fíggjarstøðuni í landinum. Hetta skrivar Børsen í gjár.

Stóra vandamálið, sum Arthur P. Schmidt vísir á, er, at eystureuropeisku londini, sum longu nú kunnu metast at vera farin á heysin, hava lænt so nógvan pening í sveisarafrankum, sum tey nú ikki megna at rinda aftur.

Hetta kann í ringasta føri hava við sær, at Sveis fer á húsagang, og fer sama veg sum Ísland, har gjaldoyra brádliga einki var vert longur.

- Tí kann sveis, eins og Ísland, vera hótt av húsagangi. Og endin kann blíva, at Sveis verður noytt at sleppa frankinum til frama fyri evruna.

Hetta er evni, sum vit í Føroyum sjálvandi mugu fylgja væl, tí fer Sveis, eins og Ísland, yvir til Evruna, fer tað eisini úr EFTA og helst upp í ES.

Um hetta verður veruleiki er einans Norra eftir í EFTA.



*Í hesum døgum spyrja fólk seg sjálvi, um lítla paradísið Sveis verður næsta landið, sum fer á heysin*